# Johnny Deluxe – eitt satt upplivilsi

**Johnny Deluxe vóru sera nógv seinkaðir. Teir komu ikki á pallin fyrr enn klokkan 2.30. Tað skuldi tó vísa seg, at tað var vert at bíða eftir teimum. Teir sp ældu eina framúrskarandi konsert, og áhoyrarnir vóru á gosi. Tað var stúgvandi fult frammi við pallin, og Johnny megnaði veruliga at fáa lív í ungu áhoyrarnar**



*Johnny Deluxe hevði eina frálíka konsert leygarnáttina. Johnny Deluxe og Gry Trampedach eru sera góðir sangarir. Gry yvirstrálaði mestsum Johnny í sanginum „Øresund", har ið tey bæði sungu duet. Mynd: Bárður Lydersen"*

Summar FESTIVALUR

Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

Dreingjareyv-bólkurin úr Danmark kom upp á pallin við góðari útstráling hóast teirra drúgvu ferð til Føroyar. Eftir at ljóð-menninir væl og virðiliga høvdu innstillað mikrofon-irnar og stemmað instrument-ini, fingu ótolnu áhoyrar-nir endiliga tað, sum teir høvdu bíða eftir allan dagin.

"Suverent hottasti bólkurin í Danmark í løtuni" segði Sjúrður Skaale, tá ið hann presenteraði teir, og Johnny Deluxe livdu upp til føgru lýsingina.

Við væl svingandi løgum, sup-er sangarum og samanspældum tónleikarum settu teir lív í áhoyrarnar. Forsangarin hevur karisma, og hann dugir væl at framføra. Tað eru eginleikar, sum eru lívsneyðugir hjá modernaðum tónleikastjørnum.

**Kvinnuligi sangarin skaraði framúr**

Forsangarin hevur eina sera vakra rødd, sum hóskar væl til teirra dreingjaliga rokk-stíl. Tónleikararnir eru eisini sera góðir. Tann, sum skaraði mest framúr, var tó kvinnuligi sangarin, Gry Trampedach, sum sang stuðulsrødd til Johnny. Hon sang eisini duet saman við Johnny í kenda sanginum "Øresund", og tá kom hennara vakra rødd veruliga til sín rætt.

Forsangarin dugdi væl at fáa áhoyrarnar at liva við í framførsluni. Hann fekk fjøldina at klappa til rútmuna. Til okkurt niðurlagið helt hann mikro-fonini yvir Vágsbø, og fjøldin sang av heilum hjarta.

Tá ið hann bað áhoyrarnar um at kasta pløgg av sær, fór okkurt turrukláði sendandi upp á pallin. Hann lovaði, at um áhoyrarnir fóru úr onkrum plaggi, skuldi hann lata seg úr onkrum. Hann fór úr t-skjúrtuni hjá sær og stóð so við berari undirtroyggju. Hetta fekk lív í kvinnuligu áhoyrarnar.

Tað var allatíðina "go" í framførsluni hjá teimum. Eingin steðgur var millum sangirnar, og tað sást, at teir høvdu vant teirra skrá sera væl. Teir megnaðu veruliga at fáa áhoyrararnar á gos, og alt náddi sítt hæddarpunkt, tá ið teir sungu tann síðsta sangin: "Drenge som mig". Øll tey ungu sungu við til hetta lagið, sum er tað kendasta hjá teimum í løtuni. Tað var stuttligt at hoyra eitt so stórt kór syngja til eitt lag.

Um eg skal fýlast á nakað, so var tað, at forsangarin í summum løgum fall burtur í ljóðmeldrinum, og serliga í einum sangi hoyrdi eg forsangaran alt ov illa. Í flestum førum varð hetta tó rættað av annars frálíka ljóðmanninum beinanvegin.

Konsertin við Johnny Deluxe var eitt satt upplivilsi. Hon fekk okkum at gloyma alt um seinkingar og avlýsingar.

## Vilja hava alternativan flogvøll

Við trimum festivalum raktum av mjørka, er veðrið vorðið ein alt ov týðandi partur av føroysku festivalunum. Tað var við hesum í huga, at frásøgumaðurin á pallinum í Vágsbøi, Sjúrður Skaale gjørdi eina politiska quick poll um alternativan flogvøll í Føroyum. Sjúrður segði, at hann hevði sæð Karsten Hansen og Bjørn Kalsø millum áskoðararnar, og spurdi um fólk fór at velja teir, um teir lovaðu ein alternativan flogvøll til næsta val. Flestu av áskoðarunum lyftu hondina upp, so har var stórur meiriluti. Sjúrður heitti so á landstýrismannin og løgtingsmannin um at halda uppat at tosað um rundstykkir sunnumorgun og um tað, sum kanska fer at henda í 2015, og ístaðin syrgja fyri einum flogvølli, um teir taka boðini til eftirtektar, vita vit tó ikki.

*nud*



*Sjúrður Skaale skipaði fyri quick poll kanning um alternativan flogvøll Mynd: Niels Uni Dam*